SJÚKRAHÚS VERKIÐ

# FESS-skurðviðgerð (Skurðviðgerð fyri kroniskan hjáholubruna)

**Hví skurðviðgerð av hjáholum?**
Fyri at bøta um frárenslið frá hjáholum og/ella gera meira pláss, so nasaspray hevur betri ávirkan.

**Áðrenn skurðviðgerðina:**

- Tú skalt fasta frá miðnátt
- Tú skalt ikki hava kontaktlinsur í, make-up ella neglalakk á, tá tú fert á skurðgongina
- Tú kanst lesa meir um fastan og doyving á heimasíðuni hjá Sjúkrahúsverkinum. www.sjukrahus.fo

**Skurðviðgerðin:**

Skurðviðgerðin er via nasagluggar og skurðlæknin verður vegleiddur við kikara. Viðgerðin tekur 1-2 tímar. Sum oftast verða meschur (sjálvupploysiligir svampar) lagdir í nasagluggar eftir skurðviðgerðina fyri at steðga bløðing.

**Eftir viðgerðina:**

Tú liggur eina løtu á viðraking, og fert síðani á eina seingjardeild

**Komplikatiónir:**

Tað kann sivbløða frá nøsini eftir skurðviðgerðina, hetta er normalt. Meschurnar í nøsini gera, at tú ikki fært so nógva luft gjøgnum nøsina. Tí kann vera gott at sova við høvdalagnum høgt.

Eftir skurðviðgerðina kunnu skorpur í nøsini arga. Tú skalt ikki snýsa tær ella ”pilka nøs. Viðmælt er, at tú skolar nøsina við saltvatni í minsta lagi 3.-4. ferðir um dagin frá degnum eftir skurðviðgerðina.

Um tú fært febur, verður illa fyri ella fert at bløða aftaná skurðviðgerðina, skalt tú ringja á tlf.nr. 304622 í dagtíð, og annars til læknavaktina á 1870.

**Nasaspray:**

Um tú nýtir nasaspray við binýrubarkhormon (t.d. Nasonex, Budesonid ella Flixonase), skalt tú sum oftast bíða við at brúka tað aftur, til tú hevur verið til kontrol á deildini.

**Pína:**

Eftir skurðviðgerðina kanst tú hava ilt. Vit viðmæla hesa pínulinnandi viðgerð sum fæst í hondkeyp:

- Paracetamol (t.d. Panodil, Pamol) 2 tabl. á 500 mg x 4 um døgnið
- Ibuprofen (t.d. Ipren) 2 tabl. á 200 mg x 3 um døgnið

**Heilsubót:**

Áðrenn útskrivan verður ein tíð til kontrol á okkara deild avtalað.

Tú verður sjúkrameldað/ur í 1-2 vikur eftir skurðviðgerðina, alt eftir hvussu hart arbeiði tú hevur.

Okt. 2025